## Samkyndir blóðgevar

Í Svøríki hevur Ríkisdagurin broytt lógina, soleiðis at frá 1. mars næsta ár kunnu samkyndir sviar lata blóð. Kortini sleppa samkyndir menn ikki at lata blóð, uttan so at teir kunnu prógva, at teir hava ikki havt kynsliga samveru við manni í eitt ár. Samkynd, sum ætla at skráseta seg sum blóðgevar, skulu útfylla eitt oyðublað við nógvum spurningum um teirra heilsuviðurskifti og teirra kynslív, og so skulu myndugleikarnir taka støðu til, um teir kunnu góðkennast sum blóðgevar, skrivar svenska tíðindastovan TT úr Stockholm.



# Ein ítróttahøll til ítrótt

**Vit hava lagt stóran dent á, at hetta skal verða ein ítróttahøll við altjóða mátum og fasilitetum. Somuleiðis hava vit lagt stóran dent á, at høllin skal nýtast til ítrótt og ikki til konsertir, dans og annað líknandi, sigur Vagnur Mikkelsen frá hallarnevndini hjá Neistanum**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Vagnur Mikkelsen læt borgarstjóran og formannin í mentanarnevndini sleppa at loysa fyrsta flagið*



Tað er ein gamal dreymur, sum nú gongur út fyri Neistan.

- Vit byrjaðu í 2002, men eisini áðrenn tað hava vit ynskt okkum aty bygt eina høll, sum er ein hondbóltshøll við altjóða máti og teimum fasilitetum, sum ein moderna hondbóltshøll skal hava, sigur Vagnur Mikkelsen.

Teir byrjaðu kortini langt framman undan at savna pening til endamálið.

- Tað byrjar alt í 1988 við einum tiltaki, sum vit nevndu Aftur í trissini, og tað gav rættiliga fitt av peningi. Helvtin fór til raksturin av Neistanum, meðan hin helvtin varð sett á bók til eitt gott endamál. Og tað var við einari høll fyri eyga, sigur Vagnur Mikkelsen.

Teir eiga eisini eini hús niðri í R.C.Effersøesgøtu, har teir hava nøkur rulluskiltir á, eitt frá 1999 og eitt frá 2005, og av tí at tað liggur so væl fyri, hevur tað givið fitt av peningi.

- Tann peningurin er eisini goymdur til hetta, og vit hava roknað við, at t´ða hendan høllin stendur liðug í 2011, hevur stuðulsfelagið hjá Neistanum sett átta milliónir í høllina, sigur Vagnur Mikkelsen.

Í løtuni metir hann, at tá høllin stendur liðug, fer hon at kosta einar 21-22 milliónir.

### Ítrótt burturav

- Vit býta fíggingina upp í trý, vit lata ein triðing ella gott tað, býráðið letur ein triðing – og hann er tøkur – og so rokna vit við at fáa tað, sum vit hava rætt til frá Mrntamálaráðnum, sigur Vagnur Mikkelsen.

Tað verður eisini roknað við trimum byggistigum, at gera byggiøkið klárt, innilokan og liðugtgerð.

- Vit hava pening til at gera økið byggiklárt og at inniloka høllina, og so taka vit tað harfrá, sigur Vagnur Mikkelsen.

Tað er heldur ikki heilt av tilvild, at høllin verður løgd við Landavegin í vesturbýnum.

- Her verður ein stórur skúlamiðdepil beint omanfyri, og vit hava eisini kannað málið hjá Venjingarskúlanum og Læraraskúlanum, og tað verður ikki nakar trupulleiki at fylla høllina við tímum, sigur Vagnur Mikkelsen.

Hann leggur dent á, at tað verður ítrótturin, ið fær innivist í nýggju høllini.

- Vit fara bert at nýta høllina til ítrótt. Tað verður ikki talan um konsertir dans og tílíkt, men verður eftir sama leisti sum Gundadalshøllin verður rikin. Og tað kemst av tí, at skulu vit hava eina høll, sum eisini skal kunna hava konsertir og líknandi, skulu vit helst keypa einar 2000 stólar, vit skulu hava okkurt at leggja á gólvið og fasilitetir at goyma hetta tilfarið í, so hølin fer at gerast so ómetaliga nógv dýrari, sigur Vagnur Mikkelsen.

Hann vónar, at tá høllin stendur uppi í 2011, er hon útgoldin, men teir fylgja eisini við tíðini innan umhvørvið.

- Ætlanin er, at hetta skal verða ein grøn høll. Vit ætla ikki at hava nakran oljutanga, men fara at nýta varandi orku, sigur Vagnur Mikkelsen.

### Býráðið fegnast

Við til hátíðarløtuna at loysa fyrsta flagið til nýggju Neistahøllina, vóru Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Jógvan Arge, formaður í mentanarnevndini hjá býráðnum.

Teir tóku báðir orðið, og báðir fegnaðust teir um hetta tiltakið, sum Neistin nú er farin undir.

Jógvan Arge vísti á, at Neistin hevði bíðað leingi eftir hesum degnum, og at ein umsókn hevði ligið inni hjá býráðnum minst tvær tær seinastu seturnar.

Hann segði, at býráðið fegið stuðlaði byggingini og helt tað vera rós vert, at eitt einsamalt ítróttarfelag fór undir eina so stóra ætlan.

Hann vísti á, at býráðið legði stóran dent á mentanina í kommununi, og harvið eisini ítróttinum. Hesi seinastu árini er eisini bygd ítróttahøll í Kollafirði og Hoyvík, Tórsvøllur er gjørdur og eitt nýtt fimleikahús er undir gerð. Samstundis skulu nú átrokandi og umfatandi ábøtur gerast á hølina á Nabb og Hoyvíkshøllina.

Jógvan Arge fegnaðist eisini um, at høllin verður løgd í vesturbýnum, so hon kann nøkta tørvin í tí økinum.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, segði, at ein av orsøkunum til, at tað hevði tikið so langa tíð at útvega Neistanum eitt økið, var júst spurningurin um, hvar hølin skuldi liggja.

Uppi í Gundadali er ikki pláss fyri einari slíkari høll, og so var spurningurin, hvar so best egnaða plássið er. Umhugsað var at leggja hana við Venjingarskúlan, men valda plássið er tað allarbesta, tí tað liggur nær við komandi skúladepilin, og kann eisini koma nýggja skúlanum á Hamrinum á Argjum tilgóða, sigur Heðin Mortensen.

Í hallarnevndini hjá Neistanum eru umframt Vagn Mikkelsen eisini Niels Mortensen, stjóri í SMS, Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini, Djóni Dalsgarð og til løgfrøðiliga hjálp hava teir havt Óla Jákup Cristoffersen knýttan at nevndini.